# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Javnaðarflokkurin minnist Tórálv við virðing

Leygarmorgunin frættust boðini um, at Tórálvur Mohr Olsen brádliga var deyður áttati ára gamal. Tórálvur umboðaði Javnaðarflokkin á løgtingi í samfull 16 ár. Fyrst í tíðarskeiðnum 1970 til 1978 og síðani frá 1980 til 1988. Øll árini var hann valdur í Sandoyar valdømi.



Tað var púra náttúrligt, at Tórálvur gjørdist tingmaður. Tí hann var virkin hugsjónarmaður burturav. Tað var hann eisini heilt til hann nú brádliga andaðist. Tórálvur hevði røtur úr verkamannaheimi og kendi sjálvur nógv til verkamannalívið, millum annað frá sínum egnu upplivingum, tá hann róði út úr Føroyingahavnini í Grønlandi. Tingmenn úr Javnaðarflokkinum minnast hansara stóra áhuga fyri viðurskiftunum hjá útróðrarmonnum og fiskimonnum annars, sum hann væl og virðiliga umboðaði við sínum stavi í fiskivinnunevnd løgtingsins øll árini, ið hann var tingmaður.

Vit yngru í Javnaðarflokkinum minnast best Tórálv fyri hansara fangandi og hugsjónarfyltu frásagnir, tá hann soleiðis av og á plagar at støkka inn á gólvið á Gamla Apoteki at kjakast við okkum um dagsins samfelagsviðurskifti. Serliga fangandi var tað at leggja til merkis, hvussu væl Tórálvur mintist niður í minstu smálutir, nær, hvussu og hví tær einstaku politisku avgerðirnar vóru tiknar langt aftur í tíðina.

Tórálvur Mohr Olsen var úr Trongisvági. Hann var føddur á Tvøroyri 2. juni 1927, men giftist seinni í Sandoynna við Svavu, sum var dóttir navnframa sandoyartingmannin, Jóan Petur Davidsen. Svava og Tórálvur fingu saman tríggjar synir.

Umframt at vera tingmaður, var Tórálvur bygdaráðslimur á Sandi frá 1970 til 1980. Hann var í umboðsráðnum hjá SEV frá 1970 til 1974. Í stýrinum fyri SEV frá 1974 til 1982. Í nevndini fyri Skipafelagið frá 1980 til 1998. Í nevndini fyri Tryggingarsambandið frá 1980 til 1998 og í umboðsráðnum fyri Tryggingina frá 1998 til 2002. Tórálvur var annars útbúgvin skipari.

Vit í Javnaðarflokkinum drýpa høvur og minnast Tórálv Mohr Olsen við størstu virðing og hava djúpa samkenslu við teimum, ið eftir sita.

**John Johannessen,
Form. Javnaðarfl. á tingi.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kristjan Joensen** í Selvindi á Strondum andaðist á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi fríggjadagin 2. mai, 88 ára gamal.

**Lena Rasmussen**, fødd Hansen úr Havn, andaðist fríggjadagin 2. mai, 86 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mánadagin kl. 16.

**Páll Jacobsen**, vanliga nevndur Páll á Nesi, Nes/Vágur, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjadagin, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju mánadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Páll, kunnu lata eina peningagávu til Vágs kirkju.

**Símin Hellisdal**, ættaður úr Svínoy, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum, Kristihimmalferðardag, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni, mánadagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Símin, kunnu lata Nýrafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum

**Jóannes Poulsen** fer til gravar úr Vesturkirkjuni týsdagin 6. mai kl. 13. Tey ið vilja minnast Jóannes, kunnu lata eina peningagávu til Føroyafelag ímóti krabbameini, konta í peningastovnunum.

**Tórolvur Mohr Olsen**, ættaður úr Trongisvági, búsitandi á Sandi, andaðist á Landssjúkrahúsinum, 3. mai, 80 ára gamal.

**Atli Nolsøe Hansen í Tórshavn** andaðist Kristi Himmalferðardag á Landsjúkrahúsinum, 61 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mánadagin kl. 15.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Kristian Jóhannes Joensen**
í Selvindi á Strondum

andaðist á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi fríggjadagin 2. mai, 88 ára gamal.
Farið verður av Røktarheiminum í Sjóvar kirkju mánakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju týsdagin 6. mai kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Karla, Jógvan Martin, Kirsthild, Dania og Joan**

Tey, ið vilja minnast Kristian, kunnu lata eina gávu til nýggja missiónshúsið á Strondum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Jóanis Poulsen**

andaðist fríggjadagin 2. mai, 79 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 6. mai kl. 13.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elinborg,
Jóhan og Chr. Eli**

Tey, ið vilja minnast Jóanis, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Pauli Næs**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Takk til prestarnar fyri góð og troystarrík orð í kapelli og kirkju.
Takk til sangarar og berarar, og takk til tykkum, sum lættu um hjá honum ta seinastu tíðina.
Takk fyri blómur og kransar og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Lisa og børnini**

**Dagurin**
**Dagurin eitur Jóhannes** fyri borgliði (Johannes ante portam). Dagurin hildin til minnis um at ápostulin Jóhannes varð illa píndur uttan fyri borgliðið Porta Latina í Róm. Hann komst undan, men varð seinni rikin í útlegd út á oynna Patmos. Jóhannes Patursson varð føddur hendan dagin í 1866, og Hans Andrias Djurhuus doyði hendan dagin í 1951.

Sosialurin -har tað hendir